

## Atli millum teir bestu

Atli Danielsen spældi allan dystiná miðvøllinum, tá ið Frem spældi dyst í donsku 1. deild sunnudagin. Mótstøðuliðið var SønderjyskE, sum liggur í toppinum, og dysturin endaði við javnleiki. Einki mál kom í dystinum. Sambært heimasíðuni hjá Frem var Atli Danielsen millum teir bestu á heimaliðnum, og hann hevði millum annað ein góða langskotsroynd. Málmaðurin Gunnar Nielsen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar.

## Svenski landsliðsvenjarin vitjar í mai

Svenski landsliðsvenjarin í fótbólti, Lars Lagerbäck, verður skeiðshaldari 4. mai, tá ið FSF fer at skipa fyri íblástrardegi fyri venjarum í fremstu deildunum og á landsliðunum.

Síðani 1990 hevur Lars Lagerbäck verið knýttur at svensku landsliðunum. Fyrst var hann í fimm ár venjari hjá ungdómslandsliðum. Í 1996 og í 1997 var hann venjari hjá B-landsliðnum, so var hann í 1998 og 1999 hjálparvenjari hjá A-landsliðnum, 2000-2004 var hann venjari hjá A landsliðnum saman við Tommy Søderberg, og síðani 2004 hevur Lars Lagerbäck einsamallur verið høvuðsvenjari hjá A-landsliðnum.



*Stjørnan er væl fyri kropsliga, og tað heldur venjarin gjørdi tær til tryggar FM-vinnarar í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Fysikkurin var avgerandi

**Henrik Gerster var ovurfegin, tá ið Stjørnan hevði vunnið triðja og avgerandi finaludystin ímóti VB. Hann helt, at spælararnir høvdu gjørt eitt sera gott arbeiði ígjøgnum árið.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

– Hetta er bara so gott. Tað er altíð gott at vinna steyp, og vit hava arbeitt hart fyri at vinna greipuna í ár. Eg haldi virkiliga, at spælararnir hava gjørt eitt gott arbeiði.

Vit spurdu síðani Gerster, hvat hevur gjørt Stjørnuna so góða í ár.

- Fysikkurin hjá okkum er so nógv betri enn hjá hinum liðunum, og tí vera vit so drúgvar ígjøgnum dystirnar. Hetta ger eisini, at vit hava vunnið gullið í ár, so fysikkurin hevur verið avgerandi.

### Hava arbeitt hart

Henrik Gerster var eisini sera glaður um góða verjuspælið hjá liðnum í dystunum ímóti VB.

- Vit hava tosað nógv um verjuna, sum ikki hevur verið so góð síðstu dystirnar, og í finalunum bæði í gjár og í dag gekk nógv betri. Hetta gongur út yvir álopið í byrjanini av seinna hálvleiki í dag, men til síðst gekk tað heila hjá okkum.

At enda spurdu vit Gerster, um Stjørnan hevði uppiborið at vunnið greipuna.

- Vit meldaðu út beinanvegin, at vit ætlaðu okkum at vinna greipuna, og eg haldi, at hetta var uppiborið. Vit hava arbeitt hart allan vegin, og nú gleði eg meg bara at sleppa at venja tær aftur komandi ár, segði ein smílandi Henrik Gerster at enda.

## - Vit eru tað besta liðið

Una Olsen var eitt stórt smíl, tá vit fingu orðið á hana eftir sigurin í triðja og avgerandi dystinum um meistaraheitið ímóti VB.

- Hetta er bara so gott. Vit vildu meir í dag, og eg haldi, at tær sóu sær ongan møguleika at vinna dystin í dag. Vit førdu nevniliga allan vegin, og eg haldi, at vit koyra tað rættiliga trygt heim.

Una helt heldur ongan iva vera um, at Stjørnan hevur verið besta liðið í ár.

- Ja, Stjørnan er tað besta liðið. Vit hava verið heldur óstøðugar í ár, men um vit spæla upp til okkara besta, so eru vit ringar at taka.

## - Galið í álopinum

Gurið Mortensen hjá VB var ikki í iva um, hvat gekk galið hjá VB sunnudagin.

- Fyrst og fremst er galið við álopinum. Vit fingu einki at rigga, og vit brendu harafturat sera nógvar opnar møguleikar, so tá verður tungt. Fyrst í seinna hálvleiki gongur eitt sindur betri, og vit koma niður á tvey mál, men so brenna vit alt ov illa, segði hon.

- Í steypafinaluni kann tað fara báðar vegir, men í landskappingini hava tær ført allan vegin, og tær hava helst tað besta liðið. So eg má bara ynskja teimum tillukku við hesum, tá hetta hava tær fortjent.

Sjálvt um Gurið og hinar í VB taptu finaluna, so var hon tó væl nøgd við kappingarárið.

- Vit eru væl nøgdar. Eingin hevði væntað, at vit komu í finaluna, so allar eru stoltar av, at vit komu so langt, segði Gurið at enda.

# Rok um hallarvarparan

**Ilt kom í VB-áskoðarar, tá hallarvarparin í KÍ-høllini gjørdist heldur partískur móti dystarenda**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur sett sín dám á hondbóltsdystir í Føroyum, at fleiri feløg nú nýta hallarvarpara at eggja áskoðararnar undir dysti. Ikki minst hevur Stjørnan slóðað fyri á hesum øki, har slíkur varpari hevur verið siðvenja nú í fleiri ár.

Leygardagin var tó um reppið, at varparin kom heilt illa fyri. Fyrst og fremst, so var tað kanska sjálvgjørt, tí ein aðalregla fyri varpararnar er, at hesir ikki einvíst skulu stuðla øðrum liðnum. Og at teir sjálvandi skulu eggja áskoðarunum, men ikki sjálvir vera við til at rópa á spælararnar.

Men tann reglan varð brotin í Klaksvík.

VB vann sær brotskast, tá góðir tveir minuttir vóru eftir at spæla. Fekk Gurið Mortensen bóltin í málið, minkaði munurin til 24-21. Meðan Gurið ger seg til at skjóta, byrjar varparin sjálvur at heppa á Stjørnuna við taktføstum »Agne, Agne« rópum til Stjørnu-málverjan.

Ivaleyst órógvaði hetta eisini Gurið, og í øllum førum misnýtti hon møguleikan. Og tað bar eisini við sær, at ein ovurtendraður VB-áskoðari vildi hava fatur á hallarvarparanum. Úrslitið var ein skræddur vestur, og tó at einki meira álvarsamt – tíbetur – stóðst av hesum, so kámaði tað eitt sindur yvir intensu hondbóltsuppgerðina í høllini.

Tí sjálvandi er tað ikki í lagi, at hallarvarparin ber seg soleiðis at. Og helst áttu dómararnir at reagerað, so Gurið fekk betri frið til brotskastið. Men at áskoðararnir soleiðis fremja sjálvjustits, er so avgjørt heldur ikki nøkur gongd leið.